# Frásøgn frá stovnsleiðaranum frá farna ári. (Foreldrafundur 2. oktobur 2023.)

## Barna- og starvsfólkatalið

Á Eiði hava vit í løtuni: 24 vøggustovubørn, 35 barnagarðsbørn, 39 frítíðarbørn og áleið 20 ung í ungdómshús. Umframt húsavørð, reingerð, integratiónstímar, stuðulstímar, avloysarar og leiðara, telur starvsfólkabólkurin í dag: 7 námsfrøðingar, ein sjúkrarøktarfrøðing og 16 hjálparfólk. Vøggustovan hevur 6,1 ársverk, umframt fyrireikingartímar 0,15 ársverk. Barnagarðurin hevur 7,45 ársverk, umframt fyrireikingartímar 0,14 ársverk. Frítíðarskúlin hevur 2,58 ársverk, umframt fyrireikingartímar 0,15 ársverk. Ungdómshúsið, 7. - 10. flokkur, hevur 0,25 ársverk. Tilsamans 16,82 ársverk.

Við tað at barnagarðsstovurnar komu upp um 16 børn eftir summarsteðgin, varð avgjørt at fáa eina triðju stovu. Tað eydnaðist okkum ikki at finna egnaði hølir aðra staðni í bygdini, so politiska avgerðin varð, at púturúmið, køkurin og fundarhølið skuldu brúkast til barnagarðsstovu. Tað er stórur saknur í hesum felagshølum, og tí verður í næstum gjørdar nakrar hølisbroytingar, so vit eitt nú fáa púturúm aftur. Tað eru tey elstu børnini, ið í ár komu at ganga í nýggju stovuni, ið kallast Dáin, og børnini trívast væl. Tað eru vansar við at býta barnagarðsbørn upp í aldursbólkar longu frá 5 árs aldur, eitt nú skerpast møguleikarnir at spæla við eldri og yngri børn. Ætlanin er at vit í komandi ár blanda árgangirnar á øllum barnagarðsstovunum.

## Virksemið rakt av sjúku

Hóast øll sóu fram til ein vetur uttan koronu influensu, sluppu vit ikki undan sjúku. Eins og hjá flest øðrum arbeiðsplássum herjaðu influensur og onnur sjúkueyðkenni so hart, at nógvar sjúkrameldingar vóru. Starvsfólk skiftust um at geva seg fult út fyri at halda virksemið koyrandi, og starvsfólkabólkurin hóraði so dánt undan. Tíverri máttu vit tvær ferðir heita á foreldur, ið høvdu møguleika, um annaðhvørt at hava barnið heima ella at heinta barnið tíðliga.

## Námsfrøðiliga virksemið seinasta ári

Seinasta ár settu vit okkum fyri *at halda áfram við at lyfta náms- og sernámsfrøðiliga økið, at samansjóða starvsfólkabólkin og trivnaðin, og vit vildu framhaldandi gera okkara besta fyri at fremja eina so góða tænastu sum til ber fyri smáu borgararnar í kommununi. Eisini sóu vit fyri okkum, at restin av garðinum í Korndalsgarði skuldi verða liðugur í ár. Somuleiðis at økið uttan fyri Spíran skuldi verða fríðkað og gjørt barnavinarligt, og*

*at tiltrongdar umvælingar skuldu verða gjørdar. Og ikki minst sóu vit fram til, at kommunan fór undir at byggja nýggjan Spíra.*

Starvsfólkabólkurin hevur ment seg á náms- og sernámsfrøðiliga økinum. Starvsfólk, í bæði Korndalsgarði og Spíranum, hava arbeitt meira við grundvirðunum í Betri vinum, ið leggur dent á at styrkja barnafelagsskapin við at fevna øll børnini,– og sostatt fyribyrgja happing. Eisini hava starvsfólk fingið fleiri royndir við at brúka tilfar úr Betri vinum kassanum og at brúka náms- og sernámsfrøðilig amboð, og gjøgnum hesi styrkt førleikan hjá sær til at seta mál fyri barnsins menning.

Dagliga virksemið á stovninum verður skipað við støði í spæl og læru soleiðis sum lýst í námsætlanini, ið hongur uppi á stovunum. Vit royna at hava ymisku evnini í námsætlanini í huga, men eisini at leggja virksemið eftir mentanini og árstíðunum, so sum fletting, seyður, jól, tjaldur, flaggdagur, høgtíðir og annað, ið hendir í bygdini.

Seinasta ári hava stovurnar í Korndalsgarði roynt at skipa virksemið fyrrapartar í bólkar, síðstu tíðina við áleið 4 børnum í hvørjum bólki. Ljóðstøðið er sjálvsagt minni, tá arbeitt verður í minni bólkum, og børnini hava betri møguleika fyri at hugbinda seg, eitt nú á túrum, í spæli ella við onkrum kreativum.

Í Spíranum fyllir tað kreativa nógv. Tey mála við ymsum teknikkum og tilfari, gera smúkkur, smíða og byggja smáttu. Eisini leggur Spírin dent á at børnini fáa fríska luft og rørslu, og børnunum dáma væl at koma túrar út í náttúruna ella at leika í ítróttarhøllini.

## Starvsfólkatrivnaður

Tað er umráðandi at leiðsla og starvsfólk sínámillum hava eitt gott samstarv, geva hvørjum øðrum fylgisskap og tosa um tað, ið stingur seg upp. Góður trivnaður á arbeiðsplássinum er ein av týðandi táttum fyri, at starvsfólk hava yvirskot og kunnu veita eina góða tænastu til børn og foreldur. Starvsfólk hava úttalað seg jaligt um trivnaðin, og tað er eisini mín fatan, at starvsfólkatrivnaðurin er góður. Ein týðandi táttur, ið hevur verið avgerandi fyri at vit hava ein góðan starvsfólkatrivnað er, at kommunan hevur játtað okkum fleiri starvsfólkatímar. Tað at námsfrøðingar hava fingið tímar til fyrireiking, at stovur hava fingið fleiri starvsfólktímar og at vit hava færri børn á stovunum, hevur havt avgerðandi týdning fyri at starvsfólk kenna minni strongd og hava betur yvirskot til at geva børnunum ein góðan dag. Ein triði táttur, ið hevur havt góðan ávirkan á trivnaðin er, at ljóðstøðið er lækkað.

Starvsfólkatiltøk, ið hava verið á skrá, eru eitt nú útferð, bowlingkvøld og hugni. Í ár varð samrátt, at leggja ráðleggingardagarnar saman í heyst, so møguleiki varð at fara ein uttanlands túr. Tað eydnaðist tíverri ikki at finna ein túr til rímiligan prís, men ætlanin er, at starvsfólkbólkurin fer ein uttanlands túr komandi vár.

### Ráðleggingardagur og starvsfólkaskeið

Vit hava havt ein ráðleggingardag síðan seinast, har vit arbeiddu við evninum Low Arousal, á føroyskum rógevandi námsfrøði, og við málseting. Hugburðurin í rógevandi námsfrøði er, at børn sum megna at vísa góðan atburð vísa góðan atburð. Í stuttum handlar rógevandi námsfrøði um, at vit sum vaksin ikki muga møta barninum við illsinni og skeldan, men heldur ávirka við róligum samskifti og blíðum lyndi.

### Umstøðurnar uttandura og ætlanin at gera nýtt frítíðar- og ungdómshús

Vit fegnast um at hava fingið ein góðan vøggustovugarð, nýggjar vognskúrar og ikki at tala um náttúrulendið omanfyri Korndalsgarð. Tað er eitt framúr gott arbeiði, ið foreldur løgdu eftir seg á garðdegnum í juni. Lendi verður nógv brúkt bæði av teimum smærru børnunum og teimum størru børnunum.

Fíggjarætlanini í 2023 hevði tíverri ikki avseting til at gera garðin í Korndalsgarði lidnan, ella at fríðka og gera økið í Spíranum barnavinarligt. Hinvegin kunnu vit gleðast um, at ætlanirnar hjá kommununi at byggja nýtt frítíðar- og ungdómshús er blivið til veruleika.

## Ungdómsvirksemi fyri børn og ung í aldrinum frá 4. til 10. flokk

Endamálið við virkseminum hevur verið, at børn og ung fáa møguleika at møta vinum, spæla, samtala, hugna sær, ella gera eitthvørt tey hava hug til, sum stimbrar áhugan hjá teimum. Týsdag hevur verið opið fyri børnum úr 4., 5., 6., og 7. flokki og hósdag fyri ungdómum úr 7., 8., 9., og 10. flokki. Tað hevur tíverri víst seg, at starsfólk undir verandi umstøðum ikki hava orku til at halda áfram við at hava virksemið fyri yngra bólkin, og tí er hetta virksemið ikki byrja aftur eftir summarsteðgin. Virksemið fyri eldra bólkin er byrjað aftur.

## Felags foreldrafundur

Í oktobur 2022 var ein felags foreldrafundur í Kolshøll, um Betri vinir og hvussu vit í felag kunnu tryggja ein sunnan og sterkan felagskap fyri okkara børn. Tað var Annika Wenningssted Jacobsen frá Barnabata, ið hevði fyrilesturin. Hon tosaði eitt nú um hvussu vit fyribyrgja happing, um týdningin av at foreldur hava áhugað í

øllum barnabólkinum og ikki bara sínum egnu børnum, og hon gjøgnumgekk tey 5 og 7 ráðini til foreldur, og foreldur fingu møguleika at tosa saman í bólki.

## Nýtt samstarv

Stovnurin hevur gjørt avtalu við Ergo Care, at tá vit hava fingið eitt nýtt púturúm, kunnu tey brúka hetta einaferð um vikuna. Henda avtala vil lætta munandi um hjá foreldrum, ið skulu koyra av bygdini fyri at barnið kann fáa ergoterapeutiska venjing. Við samstarvsavtaluni hava vit sum starvsfólk møguleika at leiða barnið til venjing.

## Intranetið

Starvsfólk eru nú von við at samskifta sína millum á Intranetinum, og nú verður skipanin víðkað, so at stovnurin eisini kann samskifta við foreldrini umvegis Intranetið. Øll børnini eru skrásett í skipanini og foreldur fáa nærri kunning í næstum, um hvussu skipanin verður brúkt. Við at samskifta umvegis Intranetið, lúka vit nýggju GDPR reglurnar (The General Data Protection Regulation).

## Framtíðar visiónir

Vit vilja framhaldandi styrkja barnfelagsskapin og gera meira við at brúka tilfarið úr Betri vinum kuffertinum og vit hava sett okkum fyri at arbeiða meira við evninum "rørslu og heilsu – tað aktiva sunna barnið". Eisini ynskja vit at kommunan í 2024 setir pengar av á fíggjarætlanini, so farast kann undir at gera næsta stigið av umvælingini av garðinum í Korndalsgarði. Í hesum stigi er ætlanin at taka helvtina av reiggjunum niður fyri at fáa meira náttúrulendi, eitt nú ein heygg ístaðin fyri asfalt, eitt størri torn, ein lítlan bóltvøll v.m. Og vit gleða okkum sjálvsagt til at fáa eitt nýtt frítíðar- og ungdómshús.

Til seinast vil eg takka; foreldrum, foreldraráðum, starvsfólkum, fyrisiting, kommunupolitikkarum og øðrum, fyri gott samstarv.

Kristina T. Larsen, leiðari.